## Liimatainen fer til Danmarkar

Petri Liimatainen, sum áður hevur vunnið heimsmeistaraheitið við svenska landsliðnum í íshockey, fer í komandi kappingarári at spæla við Hvidovre Ligahoyckey. Hann hevur seinastu árini spælt í Eysturríki. – Hann er ein royndur spælari, sum hevur vunnið eina rúgvu á sínari yrkisleið. Hann hevur spælt á hægsta støði í Evropa. Vit eru errin av, at hann spælur við okkum komandi mánaðirnar, sigur Olaf Eller, venjari hjá Hvidovre, við tv2.dk



## Murray í fjórðingsfinaluni

Andy Murray vann seg í gjár í fjórðingsfinaluni í Wimbledon-kappingini í tennis. Hóast Stanislas Wawrinka vann fyrsta settið við 6-2, bardi Murray seg aftur og vann tvey tey næstu við 6-3, 6-4. Wawrinka javnaði aftur við 7-5 í fjórða settinum, men Andy Murray var omaná í avgerandi settinum. Tá vann skotin við 6-3. Móstøðuleikarin hjá Murray í fjórðingsfinaluni verður Juan Carlos Ferrero. Ein av teimum fýra fjórðingsfinalunum verður klassiski dysturin millum Lleyton Hewitt og Andy Roddick.

# gav badmintongu



Tá badminton endiliga vann eitt heiðursmerki í liðkappingini, gjørdist tað einki minni enn gull. Ei undur í, at frøin var stór

Mynd: Álvur Haraldsen

skuldu spæla sín tvímansleik aftaná, segði Bjartur Lamhauge.

– Eg helt eisini, at vit fingu fatur í spælinum beinanvegin, so teir ongantíð sluppu inn í dystin. Vit vóru klárir frá fyrsta bólti og kundu bara koyra tað heim, uttan at vit nakrantíð kendu okkum hóttar.

Hetta var ótrúliga deiligt.

Brynhild bardist væl

Nú vóru Føroyar á odda 2-1 samanlagt ímóti Grønlandi, og eydnaðist kvinnunum eisini at vinna sín tvímansleik, so var gullið komið í pottin. Brynhild Carlsson kundi fara frísk á vøllin, og spurningurin var tí bara, hvussu væl lá fyri hjá Sigrun at reisa seg, eftir at hon hevði tapt sín dyst í einmansleikinum.

Men tað vísti seg skjótt, at her var eingin orsøk til stúran. Sigrun helt høvdið kalt og læt Brynhild taka tey tyngru tøkini, tá tað kravdist, og tað megnaði Brynhild so væl, at hon helst hevur verið orsøk til, at Mille Schiøtt Kongstad og Aviaaja Geisler mundu kenna tað, so stóðu tær yvir fyri einari maskinbyrsu.

Samspælið millum Sigrun og Brynhild riggaði øgiliga væl, og serliga var tað Brynhild, ið stóð fyri tí ágangandi spælinum, ið veruliga gav teimum báðum grønlendsku trupulleikar. Uttan at skelva á hondunum vunnu tær báðar føroysku ein tryggan 2-0 sigur, og í báðum settunum var munurin 21-16.

Og so títt og knapt, dysturin var liðugur, var alt ein stórur trunki inni á vøllinum, tí øll tey ovurfegnu badmintonfólkini stormaðu inn at fagna Sigrun og Brynhild og at fegnast um størsta sigurin, føroyskt badminton nakrantíð hevur vunnið.

Tað var stuttligt at síggja brosini og glógvandi eyguni í Vikingahallen í Godby í gjárkvøldið, og tú stóðst við einari kenslu av, at her kann saktans spyrjast enn meira burturúr, tí enn eru leikirnir ikki liðnir!

Men fyribils siga vit bara: Badminton, hjartaliga tillukku við gullinum!



Tobias Effersøe leggur Brynhild Carlsson og Sigrun Smith lag á millum settini í tvímansleikinum hjá kvinnum, sum tær báðar vunnu 2-0

Mynd: Álvur Haraldsen

# Tað størsta nakrantíð

**– Hetta er nógv tað størsta, eg nakrantíð havi upplivað sum badmintonspælari, segði Brynhild Carlsson, tá hon saman við Sigrun Smith hevði vunnið avgerandi tvímansleikin hjá kvinnum, ið gav badminton gullið í liðfinaluni ímóti Grønlandi**

Tær gjørdu tað gott og vístu í avgerandi løtu, hvussu sterkt føroyskt badminton stendur á Oyggjaleikunum á Álandi. Brynhild Carlsson og Sigrun Smith vistu ikki, hvat tær skuldu siga, tá teirra sigur til samanlagda 3-1 sigurin á Grønlandi var veruleiki.

– Hetta er bara so gott, skríggjaði Brynhild, ið ikki eina løtu var í iva um, at hetta var hennara størsta løta: – Hetta er heilt sikkurt tað størsta, eg havi upplivað sum badmintonspælari, segði hon.

Eisini Sigrun strálaði sum ein sól og valdi enntá at gera fyrstu viðmerkingina á føroyskum: – Hetta er bara fínasta slag. Eg vildi hetta bara so nógv, so tíbetur fekk eg hálað meg sjálva uppaftur, segði hon.

Báðar vóru tær samdar um, at sigurin og gullið kunnu geva kærkomið sjálvsálit til komandi dystirnar, hóast tær ásannaðu, at tað neyvan fær verið nógv betri, enn tað var í gjárkvøldið.

### Tóku av

Jóhannes Ellingsgaard frá Badmintonsambandinum var eisini ovurfegin og ikki minst errin av kvinnunum, ið megnaðu at vísa stóra styrki, tá harðast leikaði á:

– Tað var fantastiskt at síggja, hvussu tær spældu henda dystin. Ikki minst var tað stuttligt at síggja Brynhild, hvussu ósmæðin hon var og bara koyrdi á. Møguleikin var her og vit tóku hann, segði Jóhannes.

Somuleiðis var Guri Poulsen, sum ikki var við í nøkrum av finaludystunum, ovurfegin og glað: – Hetta er ordiliga lekkurt og uttan iva størsta løtan nakrantíð fyri føroyskt badminton. Tað er ringt at seta orð á tað, og vit eru bara so megaglað, segði hon.

– Hetta gevur okkum nakað eyka at taka við til einstaklingakappingina, tá hon byrjar. Nú skulu vit bara hava ein hvíludag ímillum, og so herja vit á aftur við nýggjum kreftum.

### Alt riggaði

Absalon Eysturoy, sum eisini hevði frí í finaludystinum ímóti Grønlandi, men saman við hinum livdi við og heppaði alla somlu tíðina uttan fyri vøllin, var himmalfegin um gullið:

– Hetta tykist, sum at vit hava fingið nøkur ting at rigga í evstu løtu. Vit hava frá byrjan spælt ímóti nøkrum torførum liðum, men vit hava hølvað alt av. Og her at enda sóu vit Brynhild Carlsson gera eitt útmerkað arbeiði saman við Sigrun ímóti tveimum sera góðum grønlendskum spælarum, segði Absalon.

– Grønland hevur fyrireikað seg uppá at møtt okkum og gjørt sítt heimaarbeiði, men allíkavæl megnaðu vit at taka tey á bóli og vinna gullið. Nú eru vit komin á eina góða bylgju, so nú ræður um at ríða á henni víðari í kappingini.